# Hans Fróði ger smyrsl fyri Brandy

**- Hetta er tað størsta, sum eg havi nátt í míni tíð í USA, sigur Hans Fróði Hansen, sum nú skal samstarva við amerikanska superstjørnu um hennara nýggju smyrsl-vørur**

HANS FRÓÐI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hon telist millum størstu songstjørnur í USA nakrantíð. Hon hevur eisini gjørt um seg sum sjónleikari, hon hevur verið modell, og hon hevur framleitt tónleik og film.

29 ára gamla Brandy er ikki ein og hvør. Og nú hon skal framleiða sítt egna smyrsl at selja til amerikanarar og onnur, hevur hon biðið leirvíkingin Hans Fróða Hansen um hjálp.

Í farnu viku gjørdu Brandy nevniliga avtalu við Hans Fróða Hansen um, at tey í felag skulu framleiða henna nýggju smyrsl-vørur, og at Hans Fróði fær ábyrgdina at gera nýggja brandið hjá teimum báðum.

- Hetta er tað størsta, sum eg havi nátt í míni tíð í USA. Brandy er heimskend, og samstundis sum hetta í sær sjálvum er eitt stór frambrot fyri meg, fer tað eisini at geva mær enn fleiri møguleikar í USA, sigur Hans Fróði Hansen.

## Framtíðin er ljós

Hans Fróði Hansen hevur seinni árini roynt at vunnið fram í USA, tað hevur bæði gingið væl og minni væl, men Hans Fróði er langt frá ferdigur sum poppsangari í Hollywood.

Og við nýggjasta frambrotinum heldur hann sjálvur, at framtíðin sær sera ljós út.

- Eg hitti Brandy fyrstu ferð, tí onkur, sum kendi meg og hana, helt, at vit skuldu hittast. Vit funnu skjótt út av tí og hava hildið sambandið í eina tíð. Mamma hennara er umboðskvinna fyri hana, og eg havi eisini havt nógv samskifti við mammu hennara – millum annað um hesa nýggju avtaluna, sigur Hans Fróði Hansen.

- Brandy skal framleiða eina nýggja make-up linju, og hon hevur spurt meg, um eg havi hug at samstarva við hana um hetta. Tað er serliga spennandi fyri meg, at eg havi fingið fulla ábyrgd at gera brandið, og so skulu vit selja og branda tað saman, sigur Hans Fróði Hansen.

## Brandy millum tær størstu

Brandy Rayana Norwood, sum er ættað úr Mississippi, er kend undir listarnavninum Brandy, og hon hevur serliga verið frammi sum sangari. Hon gav fyrstu fløguna út sum 15 ára gomul, og hennara fyrsta stóra hitt var sangurin The Boy Is Mine.

Síðani hevur hon havt eina røð av hittum, og fløgurnar hava selt sera væl.

Felagsskapurin hjá tónleikaútgevarum, RIAA, metir, at Brandy hevur selt fleiri enn 35 milliónir fløgur kring heimin, og tað ger hana til eina av best seljandi amerikansku songkvinnunum nakrantíð. Og sum um sølan av tónleikinum ikki var nóg stórt avrik, so hevur Brandy eisini vunnið 100 stórar og minni virðislønir fyri sín tónleik.

Brandy hevur eisini roynt seg sum sjónleikara – bæði í spælifilmi og í sjónvarpsrøð.

## Tað ber til

Hans Fróði Hansen er sera fegin um nýggju avtaluna hjá sær, og hann heldur, at hon er ein stórur møguleiki fyri seg.

- Mítt samstarv við Brandy fer uttan iva at lata hurðar upp fyri meg aðrastaðni í USA, sigur Hans Fróði.

- Eg haldi, at hetta vísir, at alt ber til, og um tú trýrt upp á tað og arbeiðir fyri



# Mugu læra at dyrka Føroyar

**Tá ið Hans Fróði Hansen av fyrstan tíð fór til USA, hevði hann fingið nokk av Føroyum, men sjónleikarin Jodie Foster broytti hansara hugsan um Føroyar. Og nú heldur hann, at føroyingar skulu læra at dyrka Føroyar**

HANS FRÓÐI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið Hans Fróði Hansen fyri nøkrum árum síðani fór av landinum fyri at royna seg, vildi hann ikki hoyra ella síggja nakað til Føroyar.

- Eg fór ikki inn á nakra føroyska heimasíðu í fleiri mánaðir, eg tók ikki telefonina, um aðrir føroyingar enn tey nærmastu ringdu til mín, og tá ið fólk í USA spurdu meg, hvaðani eg var, svaraði eg, at eg var úr Íslandi, sigur Hans Fróði Hansen.

- Eg veit í dag, hvat tað var, sum gjørdi, at eg fekk nokk av øllum føroyskum – við undantaki av matinum - og tað eri eg gladur fyri, sigur hann.

Tá ið Hans Fróði Hansen hitti kenda sjónleikaran Jodie Foster, og hon byrjaði at spyrja, hvaðani hann var, og hvar hann var uppvaksin, fekk hann seg ikki til at siga annað, enn at hann var uppvaksin í Føroyum.

- Hon var sera áhugað í at hoyra, hvat og hvar Føroyar vóru, og tá fór eg at hugsa, at kanska var tað ikki so galið at verða úr Føroyum. Eg ringdi heim til onkran av míni nærmastu og bæð tey senda mær bøkur, bókmentur og annan lesna um Føroyar, og síðani havi eg ikki fjalt út yvir, hvaðani eg eri, sigur Hans Fróði.

## Føroyar eru eksotiskar

Hans Fróði Hansen heldur, at Føroyar hava óteljandi møguleikar at føra seg fram sum ferðamannaland hjá vælbjargaðum fólki, og hann heldur, at føroyingar vita ikki, hvussu serstakar og eksotiskar Føroyar eru.

- Vit dyrka ikki okkum sjálvi og oyggjar okkara, hví skulu so onnur fólk gera tað, spyr Hans Fróði Hansen

- Hví skulu fólk koma úr øðrum londum, at vitja fuglalívið í Nólsoy, Ennibergella Vestmannabjørgini, um vit ikki sjálvi gera tað og dyrka tað? Um vit ikki dyrka tað føroyska, dyrka tað vit eru, so kann tað verða skjótt vit detta niðurímillum alt útlendskt og gloyma, hvørji vit eru, og hvar vit koma frá, heldur hann.



*Hans Fróði Hansen broytti sína hugsan um Føroyar, eftir at Jodie Foster forvitin spurdi, hvat og hvar Føroyar eru*

## Mugu hava positivan anda

Hans Fróði Hansen heldur, at munur er á íslendingum og føroyingum.

- Hyggja vit til dømis eftir Reykjavik, so kanst tú síggja stórt bilafylgi aftan á arbeiðstíð ein fríggjadag fara út úr býnum og út á landið at uppliva náttúruna og tað, hon hevur at bjóða. Heima í Føroyum, síggja vit ein fríggjadag bilafylgi vestur á flogvøllin, har fólk velja at halda vikuskifti uttan fyri Føroyar. Um vit vilja selja Føroyar uttanlands, mugu vit fyrst klára at selja tað til okkum sjálvi, sigur Hans Fróði.

Hann heldur, at ein positivur andi kann gera undurverk.

- Sjálvur trúgvi eg, at tað ber til, at vit føroyingar kunnu gera okkara land til nakað heilt serligt úti í heimi, men uttan ein positivan anda frá hvørjum øðrum og ein vilja at stuðla tí føroyska og hvørjum øðrum í Føroyum, verða Føroyar neyvan nógv meir enn eitt stað fyri krabbagoggur og camping bilar sum ikki vilja gjalda nakað serligt fyri okkara serstøku oyggjar.

- Vit skulu fyrst og fremst gera okkum greitt, at vit eru ein tjóð, eitt tungumál og eitt brand, sigur Hans Fróði Hansen.